# Føroyskir handverkarar streyma av landinum

BYGGIVINNAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Byggivinnan í Føroyum rópar neyðarróp.

Onkur sigur enntá, at byggivinnan er er við sjeymílafetum á veg ímóti eini kreppu.

Orsøkin er, at føroyskir handverkarar streyma av landinum, tí teir fáa nógv betri sømdir uttanlands.

Av tí sama er stórt trot á handverkarum í Føroyum.

Talan er bæði um timburmenn, rørleggjarar, málarar og onnur sløg av handverkarum.

Men tað seinasta er, at Føroya Land er við at verða fullkomiliga drenað fyri elektrikarar.

Orsøkin er, at tað er sera stórt trot á elektrikarum í norsku oljuvinnuni.

Norska oljuvinnan bjóðar føroyskum elektrikarum arbeiði í stórum tali og tað eru heilt nógvir, sum taka av tilboðnum.

Men tað er ikki so løgið, tí teir fáa sera góðar sømdir.

Teir arbeiða í tvær vikur og hava so frí í tríggjar vikur. Men tá hava teir eisini góðar 20.000 krónur eftir, tá ið skatturin er goldin.

Ein av teimum, sum sendir nógvar handverkarar til Noregs, er Pam Offshore.

Stjórin har, Magnus Magnussen, sigur, at í løtuni hava teir 33 føroyskar elektrikarar í oljuvinnuni Noregi.

Og tað skilst á honum, at tørvurin er alsamt at fleiri og fleiri og fleiri.

Tá ið vit spyrja hann, um hald er í tíðindunum um, at norðmenn kunnu bjóða hvørjum einasta elektrikara í Føroyum arbeiði, sigur hann, at tað gongur tann vegin....

Í næstum skulu eisini føroyskir sveisarar sendast til Noregs.

Samstundis arbeiða aðrir veitarar við at senda uppaftur fleiri handverkarar til Noregs, bæði elektrikarar og aðrar handverkarar.

Orsøkin er sjálvsagt, at tað er sera nógv at gera í norsku oljuvinnuni. Men orsøkin er eisini tann, at føroyskir handverkarar hava sera gott orð á sær, tí teir eru álítandi, arbeiðssamir og vælgjørdir.

Magnus Magnussen ásannar, at hetta kann fáa avleiðingar við sær fyri byggivinnuna í Føroyum.

Men so mugu føroyingar hugsa øðrvísi og royna aðrar loysnir.

- Men hetta er alheimsgerðin og fara føroyskir handverkarar uttanlands, verður neyðugt at fáa útlendskar handverkarar til Føroyum.

Í øllum førum heldur hann, at tað eigur at bera til hjá føroysku byggivinnuni at fáa útlendskar handverkarar.

- Men so nyttar ikki at tað skal taka mánaðir og ár at avgreiða umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum, leggur hann afturat.



*Í Noregi er gravgangur eftir føroyskum elektrikarum og tað elvir til stórar trupulleikar í Føroyum*

# Trot á handverkarum steðgar menningini

**Tað er púra øvugt, at politikararnir forða útlendingum at koma til Føroyar at arbeiða, samstundis sum at teir eggja handverkarum at fara úr Føroyum at arbeiða, sigur Jan Mortensen í Vinnuhúsinum**

BYGGIVINNAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ein stórur trupulleiki fyri samfelagið, at tað er so ringt at fáa fatur á Handverkarum. Ì síðsta enda steðgar tað menningini av samfelagnum.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, sigur, at trotið á føroyskum handverkarum er avgjørt ein trupulleiki, sum tað er neyðugt at taka í álvara.

Hann vísir á, at tað er ikki bara elektrikarum, sum tað er torført at fáa fatur á. Tað er eisini galdandi fyri timburmenn og aðrar handverkarar. Og tað er ikki bara til Noregs, at føroyskir handverkarar streyma til. Tað arbeiða eisini ein ørgrynna av føroyskum handverkarum av ymsum slagi í Danmark.

Men trotið á arbeiðsmegi ger seg eisini galdandi í føroysku flakavinnununi, tí í hvussu so er í miðstaðarøkinum, er tað torført hjá flakavinnuni at fáa fólk.

- Eg veit, at fleiri byggivirki hava leitað við ljós og lykt eftir handverkarum, men til fánýtis.

Hann sigur, at avleiðingin av hesi gongdini, er eyðsýnd.

- Avleiðingin er, at bíðitíðin eftir at fáa handverkarar, verður nógv longri. Men tá ið trotið á arbeiðsmegi er so stórt, førir tað eisini við sær, at lønin verður trýst uppeftir.

Avleiðingin er eisini í síðsta enda, at meinngin av samfelagnum verður seinkað, tí tað verður bæði longri og dýrari at byggja.

### Svingar bara annan veg

Jan Mortensen sigur, at hann hevur langt síðani staðfest, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er ein svinghurð, sum bara svingar annanvegin, og tað er úteftir.

- Tað ber væl til hjá føroyingum at fara uttanlands at arbeiða. Men hinvegin er tað ómetaliga torført at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya at arbeiða í vinnum, har trot er á arbeiðsmegi.

Einastu lond, vit kunnu fara eftir arbeiðsmegi, er í Norðurlondunum.

- Tað bar eisini væl til í áttatiárunum, tá ið tað eisini var nógv at gera í Føroyum, tí tá var lítið at gera í hinum norðurlondum. Urslitið var, at tað var onki í vegin fyri at fáa danir og íslendingar og aðrar higar í hópatali at arbeiða.

- Tann møguleikan hava vit ikki longur, tí nú er eisini nóg mikið av arbeiði í hinum norðanlondunum.

Men hini norðurlondini eru í eini heilt aðrari støðu enn vit, tí tey eru limir í ES ella EBS og hava tí ein sera stóran arbeiðsmarknað, sum tey kunnu fáa fólk frá.

Ùrslitið er, at bæði í Danmark, Íslandi og øðrum londum, koma fólk úr øllum herðashornum at arbeiða í byggivinnuni, fiskivinnuni og aðrastaðni, har trot er á arbeiðsmegi.

- Men hendan møguleikan hava vit ikki í Føroyum. Meðan danir hava alt ES, sum sítt ytra mark, haðani teir kunnu fáa arbeiðsmegi, hava vit bara norðurlond og har er eisini trot á arbeiðsmegi.

Stjórin í Vinnuhúsinum heldur tí avgjørt, at vit eiga at endurskoða okkara útlendingapolitikk, so at tað verður lættari at at fáa útlendingar til Føroyar at arbeiða í vinnum, har trot er á arbeiðsmegi.

### Øvugtur politikkur

Men samstundis heldur hann, at tað er løgtið, at landsins politikarar føra ein politikk, sum beinleiðis eggjar føroyskum handverkarum at fara uttanlands at arbeiða.

Her hugsar hann um serliga frádráttin, sum føroyskir handverkarar fáa, sum fara uttanlands at arbeiða.

Samstundis sum stórt trot er á arbeiðsmegi í Føroyum, ger útlendingapolitikkurin, at tað ómetaliga torført at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya. Men samstundis hava vit skipanir við frádráttum, sum beinleiðis eggjar føroyskum handverkarum at fara uttanlands. Hetta virkar heilt øvugt, heldur Jan Mortensen.

- At føroyskir handverkarar verða stuðlaðir at fara uttanlands í ringum tíðum skilji eg væl. Men skipanin má lagast til, so at teir eggjast at koma heimaftur, tí ið tørvur er á teimum herheima.



*- Ùtlendingapolitikkurin má endurskoðast, so tað verður lættari at fáa útlendingar til Føroyar at arbeiða, heldur Jan Mortensen, stjóri í vinnuhúsinum*